# Blómur og fagnaður til Stjørnur

**Kvinnuliðið hjá Stjørnuni fekk eina stóra móttøku á ferjuleguni í Klaksvík leygarkvøldið, tá tær komu aftur úr Vági við meistaraheitinum í skjáttuni. Ein harður og krevjandi dystur, sum tær vunnu 26-24**

HONDBÓLTUR
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*

**Klaksvík:**
Nevyan var Dúgvan komin um pollin leygarkvøldið, tá tær fyrstu rakettirnar fóru upp í loft. Og allan vegin inn eftir vánni dundi fýrverkið millum fjøllini, so tað næstan var sum nýggjársaftan.

Umborð á Dúgvuni stóðu eitt ovurfegið kvinnulið hjá Stjørnuni saman við venjara og viðhaldsfólki og veittraðu til ta stóru mannamúgvuna, sum var komin at taka í móti í øllum regninum.

Fólk vóru ovurfegin, tí tað eydnaðist Stjørnuni at vinna á VB, sum var einasta liðið, sum kundi taka meistaraheitið frá Stjørnuni.

Dysturin var harður og strævin, og VB lá á odda meginpartin av honum.



*Stjørnuvenjarin Svein Rógvi Nielsen fegnast saman við forkvinnuni í mentanarnevndini Jórun Høgnesen og formanninum í felagnum, Kristoffur Ragnarsson*

Men seinastu tíggju ella fimtan minuttirnar tók Stjørnan dyk á seg og megnaði at vinna dystin við tveimum málum. Og harvið var meistaraheitið tryggjað, og kunnu kvinnurnar í Stjørnuni nú kalla seg greipuvinnarar.

Hornorkestrið spældi ein marsj og menn stóðu við neyðblussi í hondini, tá rampin fór niður á Dúgvuni. Men har vóru ongir leikarar. Einans ferðafólk, sum ikki vistu, um tey skuldu fara í land ella ikki. Tað gekk ein løta, áðrenn Stjørnuliðið kom, men fagnaðurin var stórur, tá tær so komu gangandi í land.

Bilarnir umborð máttu so tolnir bíða, til øll mannamúgvan hevði flutt seg, men tað hevur neyvan verið nakar trupulleiki kortini. Tí, sum ein av fyrireikarunum til móttøkuna segði:

»Tað er so hugaligt at ringja runt, tá ein fyrireikar slíkt. Onki er nakar trupulleiki, og alt ber til eftir stuttari løtu«



*Tveir av útlendsku leikarunum hjá Stjørnuni, málverjin Lidja og útileikarin Katarina*

## KÍ høllin

Stjørnan hevði skipað fyri einari móttøku í KÍ høllini, og øll mannamúgvan fór beinleiðis frá ferjuleguni niðan í høllina, har leikararnir fingu blómur handaðar frá forkvinnuni í mentanarnevndini í Klaksvíkar býráð, Jórun Høgnesen.

Síðani gingu fólk og prátaðu eina løtu, áðrenn hvør fór til sítt. Ein smakkiroynd upp á tað, sum fer at henda komandi leygarkvøld, til heiðurs fyri føroyameistararnar. Tí enn er ein dystur eftir, og gullkrónurnar og steypið koma ikki til Klaksvíkar fyrr enn komandi leygardag. Og tá verður, sum skilst, eitt brak.

Liðskiparin Una Olsen segði, at tað var ómetaliga stuttligt at koma aftur til eina slíka móttøku.

– Men vit hava ein dyst eftir, so tað er onki við at taka tað róligt nú fyri tað, um meistarheitið er komið, segði hon.

Seinasti dysturin hjá Stjørnuni í hesum kappingarárinum verður leygardagin í KÍ høllini, tá tær taka ímóti Neistanum.



*Ein dystur er eftir í kappingini, so tí varð ikki so øgiliga nógv gjørt burtur úr í høllini, men blómur fingu leikararnir tó. Her er tað Joan M. Djordjevic, sum tekur ímóti*



*Ein stór mannamúgva var savnað til móttøkuna – bæði á ferjuleguni og í høllini*

## Máltindarnir

**Kvinnur**

| | | | |
|---|---|---|---|
| Simona Dziugyte | Neistin | 198 | (41) |
| Aukse Vysniaskaite | VB | 169 | (44) |
| Nicoleta Radu | Søljan | 162 | (38) |
| Daiva Tuomaite | VB | 145 | (20) |
| Ioana Rápa | VÍF | 142 | (35) |
| Gurið Mortensen | VB | 132 | (6) |
| Melica Ergic | StÍF | 125 | (17) |
| Katarina Stepanov | Stjørnan | 117 | (20) |
| Sóley Mikkelsen | VÍF | 113 | (22) |
| Joan M. Djordjevic | Stjørnan | 111 | (46) |
| Lina Andriulyte | Neistin | 96 | |
| Irina Radovici | VÍF | 96 | |
| Heidi Maria Akselsen | Søljan | 96 | (9) |
| Poula D. Olsen | StÍF | 91 | |
| Nikolina Eyðbjørnsdóttir | VÍF | 91 | |

**Menn**

| | | | |
|---|---|---|---|
| Damir Oros | KÍF | 129 | (43) |
| Dragisa Stojovic | Neistin | 121 | (4) |
| Halgir D. Olesen | H71 | 121 | (10) |
| Blagoje Buha | Neistin | 114 | (25) |
| Hans Áki Dal-Christiansen | Kyndil | 113 | (38) |
| Áki Mørk | Neistin | 102 | (20) |
| Henrik Gerster | H71 | 102 | (32) |
| Ingi Olsen | VÍF | 92 | (23) |
| Petur Martin Poulsen | KÍF | 90 | |
| Alexandur Johansen | StÍF | 88 | (30) |
| Jacob Jónsson | Kyndil | 87 | |
| Regin Petersen | KÍF | 86 | (1) |
| Høgni Klein | Kyndil | 82 | (2) |
| Gert Hansen | KÍF | 82 | (3) |
| Agnar Joensen | VÍF | 77 | (10) |

## Hondbóltsstøður

**1. Deild kvinnur**

| | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | málmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Stjørnan | 11 | 10 - 0 - 1 | 630 | 458 | 172 | 31 |
| 2 VB | 11 | 10 - 0 - 1 | 656 | 483 | 173 | 28 |
| 3 VÍF | 10 | 6 - 0 - 4 | 576 | 477 | 99 | 21 |
| 4 Neistin | 11 | 6 - 0 - 5 | 594 | 535 | 59 | 20 |
| 5 StÍF | 11 | 2 - 0 - 9 | 524 | 642 | -118 | 9 |
| 6 Søljan | 11 | 3 - 0 - 8 | 437 | 563 | -126 | 8 |
| 7 Kyndil | 11 | 1 - 0 - 10 | 372 | 631 | -259 | 3 |

**1. Deild menn**

| | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | málmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Kyndil | 9 | 5 - 1 - 3 | 564 | 527 | 37 | 20 |
| 2 Neistin | 9 | 6 - 0 - 3 | 540 | 503 | 37 | 18 |
| 3 VÍF | 8 | 5 - 0 - 3 | 511 | 461 | 50 | 16 |
| 4 StÍF | 8 | 3 - 0 - 5 | 470 | 452 | 18 | 13 |
| 5 H71 | 9 | 3 - 1 - 5 | 484 | 548 | -64 | 9 |
| 6 KÍF | 9 | 3 - 0 - 6 | 522 | 600 | -78 | 9 |




# Umsitari av kafeteria

Skála kommuna søkir við hesum eftir umsitara av kafeteria í Ítróttarhøllina á Skála.

**Arbeiðsuppgávurnar eru m.a.:**
- at miða ímóti, at vit fáa eitt virkið kafeteria í bygdini
- sjálvstøðugt at reka kafeteria og útleigan av hølum, ið hartil hoyra
- at halda rúmini rein og ruddilig

**Førleikakrøv**
Tú skalt duga at arbeiða sjálvstøðugt og hava góð samstarvsevnir.

**Starvs- og setanarviðurskiftir**
Tann, ið settur verður kemur sjálvur at reka kafeteria. Starvið verður sett frá 01.05.2004 og er fyrsta árið at rokna sum royndartíð.

**Meiri fæst at vita**
Gjølligari upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til kommunuskrivaran á tlf. 441179.

**Umsókn**
Skrivlig umsókn skal vera Skála kommunu í hendi í seinasta lagi hósdagin 15. apríl 2004.

Bygdaráðið skilar sær rætt til at velja millum umsøkjararnar ella ongan at taka.

**Skála Kommuna**
**480 Skála**

# Peugeot Partner van



Diesel
Í sera góðum standi.
Árg. 5/97
Selist við mvg
Lagalig fígging

Bilfríðkan
Velbastaðvegur 78
Tel. 317300 ella 217300

# Eysturoyingar

## Eysturoyar Teoriskúli

**Nýtt teoriskeið byrjar mánadagin 29. mars**

**Tilmelding hjá:**
**Hugo Kristiansen, tel 225225**

Sosialurin 341800

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

# ÚTBJÓÐING

Tórshavnar kommuna bjóðar hervið um- og útbygging av Kollafjarðar skúla út í almennari arbeiðstøku.

Arbeiðið umfatar at útbyggja skúlan við tilsamans umleið 950 fermetrum, umframt umbyggingar av verandi skúla.

Byggingin verður boðin út í fakarbeiðstøkum:

**A. Inniloking**

**B. Gólvarbeiði**

**C. Málaraarbeiði**

**D. HVS- og ventilatiónsarbeiði**

**E. El-arbeiði**

Útbjóðingartilfarið kann bíleggjast hjá MAP Arkitektum á tlf. 351900 innan 2. apríl móti veðhaldi á 20.000 kr, sum verður at gjalda á konto í Føroya Banka nr. 6460 168.128.3.

Viðmerkjast skal, at arbeiðsfrágreiðingar verða útflýggjaðar á fløgu. Frágreiðingarnar kunnu lesast við telduforritinum Acrobat Reader. Allar tekningar eru tó á pappíri.

Lisitatiónin verður fríggjadagin 14. mai kl. 14 í býráðssalinum. Tey, sum boðið hava, kunnu vera hjástødd, tá ið boðini verða latin upp.

**Høvuðsráðgevi og projektleiðsla:**

MAP Arkitektar sp/f, Niels Finsens gøta 31, FO 100 Tórshavn

**Konstruktiónir:**

Sp/f Verkfrøðingastovan FRI, Mannbrekka 18, FO 100 Tórshavn

**HVS og ventilatión:**

P/f Sofus M. Jakobesen FRI, J.H. Schrøters gøta 22, FO 100 Tórshavn

**El:**

KJ- Elráð, Undir Brúnni 30, FO 700 Klaksvík

SNARSKIVAN

# Tilmelding

## til Barnagarðin á Svangaskarði

Tey, ið ætla at søkja um upptøku í barnagarðin eftir summarfrítíðina, mugu lata umsókn inn áðrenn 15. apríl.

Børn, sum eru fødd í 1999 og 2000, kunnu søkja og verður tikið inn eftir aldri.

Børn, sum eru í dagrøktini, fáa umsóknarblað frá dagrøktarleiðaranum, onnur kunnu ringja ella koma inn á gólvið eftir umsóknarblaði.

Nes kommuna ger vart við, at ístaðin fyri virkandi Útibarnagarð, verður ein barnagarðsstova sett á stovn frá 1. august 2004 at rokna.

Eru spurningar hesum viðvíkjandi ber til at ringja til leiðaran á tlf. 448760.

**Barnagarðurin**
**Á Svangaskarði**
FO-650 Toftir
Tlf. 448760 - 228460

# Góðir brúktir bilar

| | |
|---|---|
| **Nissan Almera 2.0 Diesel GX** reyður, árg 1996, 4 hurðar, km 90.000 — **72.000** | **Opel Astra 1.4** grønur, árg 1996, 3 hurðar, km. 116.000, sýnaður 30. jan 2003 — **56.000** |
| **Nissan Primera 1.6 Player** svartur, árg 1995, 4 hurðar, km 139.000 — **67.000** | **Opel Astra 1.6 16V** gráur, árg 2000, 4 hurðar, km. 52.000 — **112.000** |
| **Peugeot 306 XR 1.4** reyður, árg 1999, 5 hurðar — **89.000** | **Opel Astra 1.6 16V** hvítur, árg 1996, 4 hurðar, km. 119.000 — **64.000** |
| **Peugeot 306 DieselTurbo1.9** gráur, árg 1995, 4 hurðar, km. 205.000 — **46.000** | **Opel Astra 2.0 Di Sedan** vínreyður, árg 2000, 4 hurðar, km. 97.000 — **115.000** |
| **Peugeot 406 1.8** grønur, árg. 1997, 4 hurðar, km. 129.000 — **99.000** | **Opel Vectra 2.0 DT Stc** svartur, árg 1997, 5 hurðar, km. 182.000, sýnaður 24. mars 2004 — **95.000** |
| **Peugeot 406 ST 2.0 Hdi v/aircon** vínreyður, árg. 1999, 4 hurðar, km. 132.000, fyrr 145.000 — **nú 135.000** | **Saab 9-3 2.2 TiD** bláur, árg 2001, 5 hurðar, km 74.000 — **195.000** |
| **Peugeot Expert Combi 2.0 Hdi, 110 HK, 8 sitipláss** bláur, árg. 2003, 4 hurðar, km. 19.000 — **259.000** | **Honda Accord 2.0** gráur, árg 1999, 4 hurðar, km. 96.000 — **155.000** |
| **Peugeot 406 ST 2.0** gráur, árg 1999, 4 hurðar, km. 63.000 — **130.000** | **Toyota Camry** bláur, 4 hurðar — **20.000** |
| **Peugeot 605 SRDT 2.1 Aut** bláur, árg 1994, 4 hurðar, verður seldur við brotnum gearkassa — **15.000** | **Citroen Xantia 2.0 Hdi, Station Car** grønur, árg 2000, km. 110.000, sýnaður 19. feb 2004 — **148.000** |
| **Opel Agila 1.2** grønur, árg 2001, 5 hurðar, km. 36.000, fyrr 110.000,- — **nú 95.000** | **Ford Escort 1.8** bláur, árg 1995, 4 hurðar, km. 101.000 — **59.000** |
| **Opel Corsa 1.4 Swing** grønur, árg 1999, 5 hurðar, km. 62.000 — **79.000** | **Hyundai Accent 1.5 AirCon** gráur, árg 2000, 5 hurðar, km. 92.000 — **89.000** |
| **Opel Corsa 1.4 Swing** grønur, árg 1997, 5 hurðar, km. 84.000 — **68.000** | **Fiat Cinquecento 1.1** gulur, árg 1995, 3 hurðar — **38.000** |

Gevið gætur: Bilarnir á listanum kunnu verða seldir
Fyrispurningar kunnu vera settir á telefon 345400,
eisini ber til at senda teldupost til: nissan@nissan.fo
Bilarnir finnast eisini á: www.nissan.fo

Sosialurin 341800

P/F Meinhardt Arge
v/ Oyggjarvegin • Postsmoga 3171 • 110 Tórshavn • Tel. 31 61 61

# BMW 325i

Í sera góðum standi.
Árg. 12/90
Nýsýnaður
Lagalig fígging.

Bilfríðkan
Velbastaðvegur 78
Tel. 317300 ella 217300